## Ósemja um aling

Á einum tíðindafundia á aliráðstevnuni Aqua Nor í Trómdheimi segði norski fiskimálaráðharrin, Helga Pedersen, at stjórnin hevur gjørt av at loyva laksaalarunum at økja orkuna fimm prosent næsta ár burtursæð frá nøkrum økjum, sum hava nóg nógva aling. Samtíðis gjørdi hon greitt, at eingi nýggj loyvi at ala tosk verða latin í økjum, sum eru nærhendis gýtingarplássum hjá villum toski. Andstøðan er ikki nøgd við, at laksaalararnir bara kunnu økja orkuna fimm prosent. Eitt nú heldur Framburðsflokkurin, at rúm er fyri 20 prosent øking, skrivar NTB.



## Eingir pengar til Saab

Svenska bilaverksmiðjan Saab fær einki lán frá svensku stjórnini. Tað sigur Fredrik Reinfeldt, forsætisráðharri. Koenigsegg Group hevur gjørt av at keypa Saab frá General Motors, men keypið er treytað av, at svenska stjórnin veðheldur fyri fyri einum stórum parti av fíggingini, og at seljarin skal fíggja ein part. Fredrik Reinfeldt sigur við svenskar fjølmiðlar, at um Koenigsegg Group ætlar at fáa sersømdir fram um onnur privat feløg í landinum, so verður tann ætlanin av ongum. Tað sama sigur búskaparmálaráðharrin, Maud Olofsson.

# gin peningur



# ksi

gulllaksavertíðin er úti.

Ariende kann frysta 140 tons um døgnið.

Hetta er ein vanligur trolari sum líkist skipinum Pelagos, sum í sínari tíð var heimahoyrandi í Føroyum.

Men nú hevur skipið so aðra uppgávu enn at fiska og frysta, men tekur ímóti frystum gulllaksi og feskum fulllaksi.

Í morgun eru vestmannatrolararnir, Vestmenningur og Fram, inni og veiðan hjá teimum verður fryst umborð á Ariende.

Sum skilst, koma Eysturbúgvin og Vesturbúgvin inn at landa í komandi viku. Teir eru eisini á gulllaksaveiði og fara sum skilst at landa veiðina umborð á Ariende.



*Meðan samfelagshjólini mólu við nógvari ferð, og einki tóktist ómøguligt, var trupult hjá virkisleiðslum at fáa nóg mikið av fólki til fiskavirkini. Nú er hetta eingin trupulleiki meira. Í staðin ringja bæði føroyingar og útlendingar og spyrja um arbeiði*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

# Nógv spyrja um arbeiði í Vestmanna

**Faroe Seafood í Vestmanna hevur higartil í ár virkað meira enn 4.000 tons av ráfiski, sum er eini 20-25% meira, enn felagið hevði keypt og virkað fyrra hálvár í fjør**

FISKAVIRKING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í summar hevur framleiðslan á nøkrum fiskavirkjum ligið still í einar 14 dagar, meðan arbeiðsfólkið hevur verið í summarfrí.

Á Faroe Seafood í Vestmanna byrjaðu tey aftur mánadagin í seinastu viku.

- Vit hava arbeitt hvønn dag, síðan framleiðslan varð tikin uppaftur. Vit arbeiddu allar dagarnar í síðstu viku og hava arbeitt mánadagin, týsdagin og mikudagin í hesi vikuni, men í dag er turt gólv á virkinum og eingin framleiðsla.

Tað sigur Jákup Eli Thomsen, sum er dagligur leiðari á virkinum í Vestmanna.

- Vit vænta okkum fisk aftur í morgin ella mánadagin, leggur hann aftrat.

### Meira rávøra

Jákup Eli er annars hampiliga væl nøgdur við tað virksemi, sum hevur verið fyrra hálvár í ár.

- Rávørutilgongdin hevur verið rímiliga støðug, og soleiðis hevur arbeiði á virkinum eisini verið á góðari leið.

Virkisleiðarin sigur, at samlaða ráfiskanøgdin, sum virkið í Vestmanna hevur keypt og arbeitt higartil í ár, er stívliga 4.000 tons, og í mun til fyrra hálvár í fjør, er talan um ein vøkstur í ráfiskanøgd upp á eini 20-25%.

### Fleiri ringja

Meðan samfelagshjólini í Føroyum hava malið við nógvari ferð, og einki tóktist ómøguligt, stríddust fiskavirkini við at fáa nóg mikið av fólki til sína framleiðslu og sítt virksemi.

Men hetta er ikki støðan í dag.

Jákup Eli Olsen sigur, at tað nú gongur væl at fáa fólk, og tað eru nógv, sum spyrja um arbeiði á fiskavirkinum í Vestmanna.

- Vit fáa dagliga fyrispurningar frá fólki um arbeiði, bæði í Føroyum og úr útlandinum.

Hann sigur, at umframt føroyingar, kemur meira enn so fyri, at tað eisini eru útlendingar, sum búgva í útlandinum, ið spyrja seg fyri um arbeiði.

### Skúlanæmingar

Í summar hava fleiri skúlanæmingar hjálpt til á fiskavirkinum í Vestmanna, og soleiðis hevur verið á hvørjum ári í nógv ár.

- Meðan tað seinnu árini hevur verið ein trupulleiki við at fingið nóg mikið av fólki, er hetta ikki ein trupulleiki í dag, ásannar Jákup Eli Thomsen, virkisleiðari.

Tá mest er at gera hjá Faroe Seafood í Vestmanna, hevur felagið meira enn 100 fólk í arbeiði.